ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

18. mars 2025
J.nr: 25/06730-2
Tygara skriv:
Viðgjørt: BÁT

Nr. 52-091/2024

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-091/2024 frá Kristonnu W. Poulsen, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í almanna- og mentamálum, Eiriki í Jákupsstovu, um hækkan av ansingarsamsýning

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at hækka ansingarsamsýningina fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima?
2. Um ja, hvussu nógv er ætlanin at hækka samsýningina?
3. Um ja, nær verður hendan broyting sett í verk?
4. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at leggja heimildina at áseta upphædd fyri ansingarsamsýning til kommunurnar at umsita?

Svar:

Til nr. 1, 2 og 3
Í samgonguskjalinum stendur, at landsstýrið skal viðgera tilmælini frá eftirmetingini av eldraøkinum saman við kommununum, og tað, sum semja er um, verður sett í verk. Hetta arbeiðið er partvíst farið í gongd, tí í løtuni verður arbeitt við tí tilmælinum, sum er um eftirlit á eldraøkinum. Tað er ikki avgjørt hvat farast skal undir næst, men ein endurskoðan av kunngerðini um ansingarsamsýning kundi verið tað næsta.

Sum víst á í svari upp á § 52 a fyrispurning í juni og november 2023 vísti táverandi landsstýriskvinna í almannamálum á, at eitt uppskot til broyting í kunngerð um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum var til hoyringar í 2022. Tá var ætlanin av samsýningin skuldi hækka upp til 18.000 kr. Hetta var í sambandi við at eldraøkið varð eftirmett í 2021.

Kommunurnar vístu tá á, at kunngerðin um ansingarsamsýning er ógreið og manglar nógvar ásetingar. Tær mettu, at tørvur var á at kunngerðin bleiv grundleggjandi endurskoðað, og mæltu tí frá at dagføra upphæddina, uttan at dagføra sjálva kunngerðina.

Tó er eingin áheitan komin frá kommununum um at endurskoða kunngerðina, eftir at eitt uppskot var til ummælis í 2022. Ynskiligt er, at ein endurskoðan av kunngerðini um ansingarsamsýning verður gjørd í samráð við kommunurnar, soleiðis at kommunurnar kunnu

koma við sínari meting av, um ansingarsamsýningin skal hækka, og hvussu nógv hon skal hækka. Tað ber ikki til at siga, nær ein broyting av upphæddini kann setast í verk, fyrrenn arbeiðið við eini endurskoðan er framt.

Til nr. 4
Í løtuni er eingin ítøkilig ætlan um, at geva kommununum heimild til sjálvar at áseta upphæddina.

Almanna- og mentamálaráðið 18. mars 2025

Eirikur í Jákupsstovu,
landsstýrismaður